

# HB Í ÓKENDUM HAMI

**VODAFONEDEILDIN** HB hevur ikki verið sannførandi á vøllinum í hesum kappingarárinum. Men føroyameistararnir eru nú ájavnir í stigum við oddaliðið

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| EB/Streymur | 0 |
| HB | 1 |

Kristján Guðmundsson hevði greiðar ætlarnir, tá hann setti seg í venjarasessin hjá HB í vetur. Longu á fjølmiðlafundinum í sambandi við setanina, staðfesti hann, hvat hann metti verða sømiligt og ikki. Íslendingurin vildi halda fram við tí, sum hevur eyðkent Havnar Bóltfelag seinastu mongu áratíggjuni. HB skal verða nógv á bóltinum og støðugt trýsta mótstøðuliðini.

– Eg vil spæla framrættaðan fótbólt, og mítt lið skal spæla bólt. Men samstundis mugu vit ikki gloyma at standa væl á vøllinum, segði Guðmundsson við heimasíðuna hjá HB.

Men undir skræðuni er veruleikin kortini ikki so einfaldur.

HB hevur ikki spælt undirhaldandi fótbólt í hesum kappingarárinum. Kanska tvørturímóti. Stundum hevur liðið víst tekin um manglandi støðufesti, lítið samskifti og ótryggleika á vøllinum. Har til hava uppspølini mangla hugflog. Útgangsstøðið verður tí oftast at binda um heilan fingur og spæla primitivt.

Men eitt kann ikki takast frá teimum. Tað eru tey 11 stigini, sum liðið hevur skavað til sín higartil.

Trý teirra komu í hús í torføra útidystinum við Margáir móti EB/Streymi í gjár.

Vagnur Mohr Mortensen viðgongur, at HB var ikki sannførandi.



**LUFTBÓLT**

*Gert Hansen og málskjúttin, Rógvi Poulsen, í luftdysti*

Mynd: Sofus D. Johannesen

## Gjørdu ikki nógv av framrættað

– Dysturin var ikki væl spældur. Liðini vildu ikki gera nógv av í framrættaða spælinum, sigur Vagnur Mohr Mortensen, sum spældi samfullar 90 minuttir í verjuni hjá HB.

Egil á Bø, liðskipari hjá EB/Streymi, tekur undir.

– HB og EB/Streymur vóru í ókendum hami í gjár, sigur verjukempan.

### Alt telur

HB hevur verið í stórari framgongd, síðan eyðmýkjandi ósigurin fyri B36 í kappingini um Løgmanssteypið. Eyðmýkjandi, tí HB vísti hvørki frá ella til í grannauppgerðini, sum var fyrsti skrásetti dysturin, har Kristján Guðmundsson stóð við stýrisvølin.

Vinnarahugburðurin og neyðuga hepni hevur víst seg at tryggja verandi føroyameistarunum heili 11 stig. Tað er avgjørt ikki takkað verið fótbóltsspælinum, at HB er nú á øðrum plássi, ájavnt í stigum við B36, sum er oddalið. Gundadalur eigur tí oddasessin í Vodafonedeildini.

Vagnur Mohr Mortensen metir, at hann og liðfelagarnir eru á røttari kós. Tað eru fyrst og fremst stigini, sum telja.

– Vit eru framvegis ósigraðir, og HB er í oddinum. Tað stendur ikki illa til. Venjarin vil sjálvsagt hava sína ávirkan galdandi, og fleiri nýggj andlit eru í hópinum. Tað tekur tíð, sigur Vagnur Mohr Mortensen.

Rógvi Poulsen stóð fyri einasta málinum í dystinum við Margáir í gjár. EB/Streymur misti bóltin í uppspælinum, áðrenn Fróði Benjaminsen spældi Poulsen, sum hevði runnið seg í frálíka støðu. Einsamallur við málverjan var Rógvi Poulsen tryggur.

*uni@sosialurin.fo*